ETISKA RÁÐIÐ

# Hoyringssvar til kunngerð um um krabbameinsskrá og um at fráboða krabbameinssjúku o.a. í skránni

Etiska ráðið takkar fyri møguleikan at koma við viðmerkingum til kunngerðina um krabbameinsskrá og um at fráboða krabbameinssjúku o.a. í skránni. Sum heild metir Etiska ráðið, at endamálið við kunngerðini er gott. Tó hava vit tvær viðmerkingar.

Fyrra viðmerkingin snýr seg um § 2. Sum heild meta vit at tað altíð er rætt, at avmarka vitan, ið kann knýtast til ávísar persónar í so stóran mun sum gjørligt, um ikki upplýsingarnar eru neyðugar fyri at uppfylla endamálið. Tá um ræður krabbameinsskránna geva upplýsingarnar ein biður um meining. Tó meta vit at ein kann seta spurnartekin við, hvørt tað er rætt at upplýsa navnið á sjúklinginum uttan samtykki. Við p-talinum eigur ein at kunna fáa vitan um sjúklingin úr øðrum databasum, um tað er tað tankin er við at upplýsa navnið. Er tað ein avbjóðing at brúka p-talið til tað, tá eitt nú um ræður vitan skrásetta í heilsuverkinum í Danmark ella í øðrum skipanum, har ein annars kann enda við dupult skráseting, so eigur ein at arbeiða fram ímóti, at skipanirnar kunnu samskifta uttan eyðmerkjandi vitan. Vit gita at ein tanki við at skráseta navnið er tá um ræður ættargransking, og at síggja sjúkrasøguna í ættartrøum, men vit loyva okkum at seta spurnartekin við, hvørt tað hevði verið rætt at gjørt, uttan samtykki frá persónunum ein granskar, tá ein kann seta ítøkilig nøvn á viðkomandi persónar.

Ein kundi eisini sett spurnartekin við, hvørt tað er rætt at upplýsa bústaðin hjá fólki. Hetta tí Føroyar eru so lítlar, at í nógvum førum kann ein eyðmerkja hvønn persón talan er um, tá um ræður tey smærru støðini. Tó meta vit á teirri eini síðuni, at vitanin um bústað hevur so mikið stóran týdning, tá um ræður gransking í krabbameini, at her viga tey atlitini tungt, og á hini síðuni, at har er munur á hvussu neyvt ein nágreinar hvønn persón talan er um, tá ein upplýsir navn og tá ein upplýsir bústað.

At enda er tað óheppið, at diagnosurnar á Skjal 1 eru á donskum. Her hevði tað verið rættast, at antin brúkt latínsku heitini, ella at brúka føroysku heitini.

Etiska ráðið • er@er.fo • J.C.Svabosgøta 43 • 100 Tórshavn • tlf: 219484 • www.etiskaradid.fo